

**Heini Eysturoy**
*leiðari á vegadeildini hjá Landsverki*

# Heðin Mortensen forðaði innkomuvegnum

*Tá borgarstjórin í Tórshavnar Kommunu í bløðunum gevur Landsverk ábyrgdina fyri, at arbeiðið við innkomuvegnum til Havnina er steðgað, kundi einki verið meiri misvísandi. Tað er nevniliga borgarstjórin sjálvur, ið er orøkin til, at arbeiðið er steðgað.*

Ein onnur rættleiðing til Heðin Mortensen er, at ferðslan inn í Havnina er munandi minni enn hasir 11.000 bilarnir, hann vísir á. Tað hevði borgarstjórin sæð, um hann ómakaði sær at blaða upp í ferðslufrágreiðingini hjá Landsverki.

Tað, sum higartil er tilrættislagt av innkomuvegnum, er gjørt í samstarvi við Tórshavnar Kommunu. Nakað, sum Jan Christiansen og aðrir býráðslimir eisini hava víst á í lesarabrævi í bløðunum herfyri. Arbeitt hevur sostatt verið eftir avtalu við kommununa. At so skiftandi embætisfólk, borgarstjórar og býráðssamgongu hava viljað havt síni fingramerki í vegaætlanina, hevur tíverri órógvað arbeiðið so nógv, at ætlanin nú liggur still.

Stóra ósemjan snýr seg um talið av íbindingum til býlingarnar í Hoyvíkshaganum. Tórshavnar Kommuna hevur kravt íbindingar í allar býlingarnar, meðan Landsverk av ferðslutrygdarávum vil hava so fáar sum gjørligt. Nevniliga bert ta einu við Stórutjørn, og haðani skal ferðslan leiðast inn á ein kommunalan sambindingarveg. Ein loysn, sum á fullgóðan hátt fer at sampakka við býarferðsluna, men sum fyrst av øllum ger ferðsluna í økinum munandi tryggari.



### Krevur tunnil men noktar at gjalda

Upprunaliga orsøkin til, at vegagerðin steðgaði, var, at Tórshavnar Kommuna við Heðini Mortensen á odda kravdi ein tunnil oman fyri Villingardalsvegin, ístaðin fyri ein veg niðanfyri, sum Landsverk hevur ætlanir um at gera. Tó vildi borgarstjórin ikki hoyra talan um at gjalda meirkostnaðin fyri tunnilsætlanina. Sami Heðin Mortensen noktaði eisini at lata lendið til vegin, og tí var als einki endamál at halda fram við arbeiðinum.

Tað, sum borgarstjórin førir fram um, at innkomuvegurin til Havnina gjøgnum Hoyvíkshagan, ikki er í tráð við framtíðarætlaninar hjá Tórshavnar Kommunu, skilja vit ikki rættiliga. Gjørdar eru víðar brúgvar til at føra ferðsluna niðan undir landsvegin við Sundsvegin og Flatarvegin. Somuleiðis verður vegur eftir ætlan førdur undir innkomuvegin við Stórutjørn. Hesar loysnir, ið eru valdar, eru mettar at vera tær mest ferðslutryggu, tí tær halda býarferðsluna – við 50 km/t hámarksferð – og tey gangandi burtur frá innkomuvegnum, har hámarksferðin er 80 km/t.

Tá Heðin Mortensen nevnir, at Tórshavnar Kommuna sum byggimyndugleiki hevur verið hildin uttanfyri, er fyrst at siga, at byggimyndugleikin hjá kommununi í prinsippinum einki hevur við landsvegagerðir at gera. Hóast hetta hava fakkunnleikin hjá kommununi og Landsverki samstarvað frá byrjan av. Nógvir fundir hava verið við Tórshavnar Kommunu um innkomuvegin, har avtalur um loysnir eru gjørdar. Fundarfrásagnir skjalprógva, at so er.

Sum dømi um, at Tórshavnar Kommuna hevur verið við í ætlanini, kann nevnast, at vegurin við Stórutjørn varð fluttur fyri at gera pláss fyri stóru byggiætlanunum har uppi. Tórshavnar Kommuna hevur goldið umleið eina millión krónur fyri at flyta tað, ið longu er gjørt av innkomuvegnum, umframt at umprosjektera vegaføringina.

### Borgarstjórin ger av nær byrjast kann aftur

Vit kunnu vissa Heðin Mortensen um, at vit á Landsverki ikki hava sovið í tímanum, men hava arbeitt av øllum alvi at fyri at fáa eina vegaloysn, ið tænir okkum øllum best.

Sum borgstjórin eisini veit, verður í løtuni løgd seinasta hond á eina kanning av innkomuvegnum og teimum loysnum, ið Landsverk, og síðani Tórshavnar kommuna, hava kravt. Tá kanningin er liðug, fer Landsverk at mæla til at fylga tilráðingunum í frágreiðingini.

Heðin Mortensen kann – hóast nógvar ávaringar – eina og aleina takka sær sjálvum fyri, at arbeiðið við innkomuvegnum steðgaði. Nær arbeiðið kann verða tikið uppaftur, ja, tað er upp til sama borgarstjóra at gera av. Hetta er sjálvandi treytað av, at Løgtingið játtar neyðuga fígging til at halda fram við vegagerðini.

***Heðin Mortensen kann – hóast nógvar ávaringar – eina og aleina takka sær sjálvum fyri, at arbeiðið við innkomuvegnum steðgaði***



**Jaspur Vang**
*Løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin*

# Floksformaðurin má taka frástøðu

*Formaðurin í Tjóðveldi má alment taka frástøðu frá tingmanni, ið umtalar politisk mótstøðufólk sum landasvíkjarar.*

Undirritaði og mong við mær, eru illa við av tí, sum løgtingsmaðurin og næstformaðurin hjá Tjóðveldinum, Tórbjørn Jacobsen, leggur navngivnar og ónavngivnar limir í Føroya Løgtingi undir.

Í blaðgreinini »Imperialismunar skutilssveinar« tveitir Tórbjørn Jacobsen um seg við orðum, sum minna um tað, ið var at hoyra í gøtunum í Týsklandi í 1930-unum. Fólk verða í nevndu grein skýrd landasvíkjarar, tí at tey ikki taka undir við stevnu Tjóðveldisins, ið sambært nevnda politikara er tann sterkasta megin.

Tað er tó at fegnast um, at Sjúrður Skaale, tingmaður í Tjóðveldinum, alment hevur greitt frá, at hann hevur eina aðra fatan enn Tórbjørn Jacobsen.

Tó eri eg bilsin um, at orðini hjá Tórbirni Jacobsen framvegis eru at finna á heimasíðuni hjá Tjóðveldinum. Heimasíðan www.tjodveldi.fo er nevniliga almenna heimasíðan hjá flokkinum og má tí metast at vera málgagn hjá flokkinum. Hetta merkir væl saktans, at Tjóðveldi stendur aftan fyri orðini og óhugnaliga hugburðin, tey umboða.

Tað hevði verið upp á sítt pláss, at formaðurin í Tjóðveldinum alment greiðir okkum frá, um Tjóðveldi sum flokkur stendur aftan fyri orðini hjá tingmanninum Tórbirni Jacobsen um, at tingfólk, ið hava eina aðra hugsan enn Tjóðveldi, eru landasvíkjarar.

Eftir míni hugsan má floksformaðurin taka greiða frástøðu frá tingmanninum og hansara óhugnaligu úttalilsum.

Tekur Tjóðveldi hinvegin ikki frástøðu frá hugburðinum, sum Tórbjørn Jacobsen alment í fjølmiðlunum og á heimasíðu Tjóðveldisins gevur til kennar í omanfyri nevndu grein, kann einasta niðurstøðan verða, at Tjóðveldi og formaður tess fult og heilt taka undir við Tórbirni Jacobsen, løgtingsmanni og næstformanni Tjóðveldisins.

***Undirritaði og mong við mær, eru illa við av tí, sum Tórbjørn Jacobsen leggur navngivnar og ónavngivnar limir í Føroya Løgtingi undir***